# Handilsdepil við kongresshøll í miðbýin

**Umsíðir er líkt til at nógv umtalaði handilsdepilin kemur til miðbýin í Klaksvík. Býráðið skal í kvøld viðgera og játta eina tillaging av hesi stóru og stórfingnu ætlan, sum fólk hava bíðað spent eftir í langa tíð.**

HANDILSDEPIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Nógv eftirspurdi handilsdepilin skal liggja her í miðbýnum í Klaksvík*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Klaksvík:** Nógv fólk hava bíðað eftir at okkurt munagott skuldi henda við hesi áhugaverdu ætlanini í miðbýnum í Klaksvík.

Ætlanin sjálv hevur verið ávegis í fleiri ár, men í kvøld kemur málið um eina útstykkingarætlan fyri miðbýin til viðgerðar.

Málið snýr seg um ein rættiliga stóran handilsdepil, sum m.a. eisini skal hýsa eini høll til kongressir og fundir.

Sum skilst er ætlanin eisini at eitt stórt torg skal verða í handilsdeplinum, og sjálvandi hópur av handlum og øðrum, sum natúrliga eigur at verða í slíkum depli.

– Vit síggja nógvar møguleikar í einum slíkum handilsdepli, sigur Jákup Mikkelsen, næstformaður í Klaksvíkar býráði við Sosialin.

Fyri hann – og mong onnur – er lítil ivi um, at ein handilsdepil av slíkum slagi er alneyðugur fyri Klaksvíkina í framtíðini.

– Hann er neyðugur fyri fólkið her í Norðoyggjum. Og hann er ikki minst neyðugur fyri tey mongu, sum fara at koma hendavegin nú Norðoyatunnilin letur upp, sigur varaborgarstjórin.

Onkur heldur at handilsdepilin kemur í seinna lagi. Hinvegin kann staðfestast, at tíðspunktið hetta málið kemur fram aftur er ógvuliga væl valt.

Um fáar dagar verður koyrandi undir Leirvíksfjørð. Og tey mongu vitjandi kunnu nú síggja fram til at sleppa til handils í einum stórum handilsdepli mitt í Klaksvík um nøkur ár.

### Prinsipielt loyvi

Klaksvíkar býráð skal á fundi í kvøld viðgera hetta málið, sum hevur verið í umbúna í eina tíð.

Í uppritinum til hetta málið verður sagt, at nevndirnar í býráðnum hava staðfest, at her er talan um eitt heilt nýtt uppskot til eina miðbýarætlan – í veruleikanum triðja uppskotið!

– Innihaldsliga líkist henda ætlanin tó nógv teimum undanfarnu, verður sligið fast.

Tað ið vantar er, at býráðið av nýggjum játtar eitt prinsippielt loyvi til tær tillagingar, sum nú eru í málinum.

Hetta skal gerast í fyrsta umfari. Seinni skal so tann fíggjarligi parturin hjá kommununi takast upp til viðgerðar.

Tær ymisku nevndirnar í kommununi hava havt hetta til viðgerðar og hava sagt gott fyri tí.

Mentanarnevndin tekur eisini undir við tí mentanarliga partinum av verkætlanini, sambært einum uppskoti frá KHRAS-arkitektum sum teir gjørdu í mars mánaði í ár.

Nevndin mælir til, at hesin parturin verður lýstur til fulnar innihaldsliga og hvussu hesin kann verða framdur.

### Spakan í

Jákup Mikkelsen leggur stóran dent á tann týdningin, sum ein slíkur handilsdepil kemur at hava fyri býin.

– Nógv tíð er longu farin, meðan málið er vorðið fyrireikað. Nú vóna vit at spakin skjótt kann verða settur í hesa ætlanina, sigur hann.

Í fyrsta umfari er bert talan um sjálva tillagingina av ætlanini. Seinni skal tann fíggjarligi parturin hjá kommununi takast til viðgerð.

Hesin parturin snýr seg m.a. um liðugtgerð av økinum.

---

# Australiari við føroyskari rót

**Føroyingar finnur ein allastaðni kring heimin, og fleiri teirra búgva í so fjarskotnum landi sum Australien. Nú er ein maður í Klaksvík áhugaður í at frætta nærri um ein føroying, sum fyri 136 árum síðani legði leiðina hagar.**

ÚTLEGD
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*




*Gravsteinurin yvir Lourentz og konu hansara Elizabeth*

Hetta er stutta søgan um ein mann, sum er føddur í Føroyum, og sum fyri meiri enn 130 árum síðani flutti so langt sum til Australiu.

Talan er um Lourentz Peter Johnson, sum varð borin í heim í 1853. Hann flutti síðani sum blaðungur til Victoria í Australia, helst umleið 1870 "for the gold rush", sum tikið verður til.

Nógv virksemi var tá í gullnámunum í hesum økinum, og sagt verður um Lourentz at starv hansara var "mining engineer" – t.v.s. var maskinmaður í einum av námunum her.

Víðari verður sagt, at hann giftist við Elizabeth Beacham hin 6. mars 1880 í Ballarat, og at tey fingu 11 børn. Eitt teirra er Merran, sum Hilda Alice Johnson var móðir at.

Lourentz sjálvur andaðist 1. februar 1918 í Maryborough í Victoria, eins og myndin av gravsteininum vísir.

Av øðrum ættarfólkum kunnu verða nevnd hesir persónar:

Hilda Alice Johnson
(1898 – 1976)
Joyce Johnson Hazeldina
(1915 - )
Margaret Lloyd Keir
(1937 - )
Merran Frances Dyer
(1961 - )

### Alt hevur áhuga

Jógvan Páll Poulsen í Klaksvík er sera áhugaður eftir at frætta, um nakar av lesarunum hjá Sosialinum munnu vita meiri um henda Louentz.

– Hann stendur til at hava "Johnson" til eftirnavn. Men tað kann eins væl vera "Joensen", sum er vælkent her hjá okkum, sigur Jógvan Páll.

Nøvnini í familjuni annars eru eisini nøvn, sum eru kend á okkara leiðum. Tí er hann sera áhugaður í at vita, um nakar veit meiri um henda mannin og ætt hansara.

Hann hevur roynt hetta áður, men fekk hann ikki so nógv burtur úr júst tá. Nú roynir hann so aftur.

– Her hevur sjálvt tann minsti upplýsingurin stóran áhuga, sigur hann.

Veit onkur nakað at siga um henda mannin og ætt hansara, so kunnu tey ringja til Jógvan Páll – 456729 ella 227175.